## Gerðabók hjá Vestmanna bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 18. juni 2025, kl. 17.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Sára Jógvansdóttir, Símin Jákup Højsted, Anja Haldansen, Karl A. Olsen, Pauli Magnussen, Jákup S. Jóanesarson og Janus Atli Jensen.

**Skrivari:** Rúna Koba

---

Áðrenn fundin greiddi Sára Jógvansdóttir, borgarstjóri, frá, at síðani skráin er løgd, er eitt nýtt mál innkomið: møgulig breiðking av parti av Gerðisvegi. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um at loyva, at málið verður sett á skrá og viðgjørt fyri afturlatnum hurðum. Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti. Málið verður sett á skrá sum mál nr. 45.

Varð viðgjørt fyri **opnum hurðum**

**Mál 39**
Ársroknskapurin hjá Vestmanna kommunu fyri 2024
J.nr. 32002-1-2023

Ársroknskapurin fyri 2024 varð lagdur fram.

**Viðv. 39**
Á fundinum skeyt Sàra Jógvansdóttir, borgarstjóri, upp, at samtykkja ársroknskapin fyri Vestmanna kommunu fyri 2024.

Uppskotið hjá Sàru Jógvansdóttir, borgarstjóra, varð einmælt samtykt.

**Mál 40**
Eykajáttan til maskinhøllina – 2. viðgerð
J.nr.: J.nr.: 30102-1-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 14. mai 2025 mál um eykajáttan til útbygging av maskinhøllini.

Útbyggingin av maskinhøllini gjørdist dýrari enn ætlað. Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru kr. 450.000 settar av til arbeiðið, sum kostaði kr. 462.750.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at mæla til at samtykkja eina eykajáttan á kr. 12.750.

Vestmanna bygdarráð samtykti eykajáttanina við 1. viðgerð á fundi tann 21. mai 2025

**Viðv. 40**
Eykajáttanin varð einmælt samtykt við 2. viðgerð

**Mál 41**
Eykajáttan til rakstur, Vestmanna skúli – 1. viðgerð
J.nr.: 1606202-2-2021

Í telduposti dagf. 11. juni 2025 søkti Kristianna Vinniedóttir, skúlastjóri um stuðulstímar til skúlan.

Vestmanna skúli hevur fingið játtað námsfrøðiligar tímar frá undirvísingarmálaráðnum, tó mangla tveir tímar um vikuna, um stuðulin skal røkka til allar undirvísingartímarnar.

Søkt varð um at økja raksturin við kr. 25.000 til tímalønir.

**Viðv. 41**
Eykajáttanin varð einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**Mál 42**
Keyp av neystalendi
J.nr.: 8202002-5-2025

Vinnu- og havnarnevndin viðgjørdi á fundi 3. juni 2025 umsókn frá Tórarinn Didriksen um keyp av neystalendi soleiðis, at neystalendi hansara matr. nr. 23g, Bakkavegur 155, hevur somu longd sum tey nýggju neystini.

Vinnu- og havnarnevndin mælir til at ganga umsóknini á møti soleiðis, at hann fær loyvi til at keypa lendi árakað nýggju neystini.

Fíggjarnevndin viðgjørdi tilmæli frá vinnu- og havnarnevndini á fundi tann 10. juni 2025.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at mæla til at taka undir við tilmælinum frá vinnu- og havnarnevndini og at selja fyri 250 kr fermeturin, keypari rindar fyri umskipan av lendi.

**Viðv. 42**
Tilmælini frá vinnu- og havnarnevndini og fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál 43**
Broytingar í byggisamtyktini og bygdarskipanini fyri Vestmanna kommunu
J.nr.: 102032-1-2025

Vestmanna Bygdarráð samtykti á fundi 21. mai 2025 broytingar í byggisamtyktini og bygdarskipanini fyri Vestmanna kommunu.

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 10. juni 2025 mál um broytingar í byggisamtyktini og bygdarskipanini fyri Vestmanna kommunu.

Undir punkt 9: víðkan av sethúsaøki matr. nr. 205ca, er skeivt veg-litra komið at standa. Har skal standa litra "cd" í staðin fyri litra "a".

Mælt verður til at broyta pkt. 9 til soljóðandi:

9. víðkan av sethúsaøki matr. nr. 205ca.
- Vestmanna kommuna hevur samtykt at selja eigarunum av matr. nr. 205ca lendi burtur av litra "cd", Fjalsvegi. Lendið verður selt soleiðis, at tey ognast lendið ímillum grundstykki teirra matr. nr. 205ca og Fjalsveg litra "cd".
Sethúsaøkið verður víðkað við lendinum ímillum grundstykkið matr. nr. 205ca og Fjalsveg, litra "cd", soleiðis, sum vegurin er liðugt gjørdur.

Nevdin mælir til at góðkenna broytingina.

**Viðv. 43**
Tilmælið frá teknisku nevnd varð einmælt samtykt.

**Mál 44**
Umsókn um marknaumskipan millum matr. nr.: 186a og 4l
J.nr.: 102032-2-2025

Í telduposti dagf. 11. juni 2025 sendi umhvørvisstovan umsókn frá Sámal Durhuus og Bergfinnur Durhuus um marknaumskipan millum ogn teirra á matr. nr.: 186a og 4l.

**Viðv. 44**
Bygdarráðið samtykti einmælt at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 45**
Møgulig breiðking av parti av Gerðisvegi
J.nr.: 501022-1-2025

Sára Jógvansdóttir, borgarstjóri, hevur biðið um og fingið kostnaðarmeting frá Articon uppá breiðking av Gerðisvegi frá Rógvu og út til parkeringsplássið við missiónshúsið við gongubreyt í ovara borði.

Kostnaðarmetingin er uppá 490.889,96 kr uttan mvg – og eisini uttan asfaltering.

Sára Jógvansdóttir, borgarstjóri, mælir til at fara undir breiðking av hesum partinum av Gerðisvegi.

**Viðv. 45**
Sára Jógvansdóttir, borgarstjóri, skeyt upp at játta kr. 700.000 til arbeiðið fyri at tryggja, at arbeiðið kann gerast liðugt í ár.

Uppskotið hjá Sáru Jógvansdóttir, borgarstjóra, varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl 17:55

Sign.:

Sára Jógvansdóttir Símin Jákup Højsted Anja Haldansen Karl A. Olsen

Pauli Magnussen Jákup S. Jóanesarson Janus Atli Jensen